Skjal (4)

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn 14.09.2018
J. nr.
Viðgjørt J. Christiansen
Tykkara j. nr.

**Hoyringsskriv viðvíkjandi niðanfyristandandi lógaruppskotum**

1) Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð
2) Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin
3) Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.
4) Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd
5) Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna- og heilsumálum

**MEGD hevur hesar viðmerkingar. Inni í uppskotinum frá MEGD eru viðmerkingar frá felagnum Hoyr.**

**AD 1) Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð**

MEGD fegnast um, at við vælferðarlógini kemur ein føroysk løgtingslóg um almannatrygd og vælferð. MEGD fegnast um, at við lógaruppskotinum verður víst til, at endamálið er, at samfelagið frameftir hevur eina lóggávu, sum lýkur tey krøv, sum nútíðarsamfelagið setir, har dentur verður lagdur á sjálvsavgerðarrætt borgarans. Eisini verður víst á, at lógaruppskotið fevnir um Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**§2 Ráðgevingarskylda**
MEGD fegnast um, at ráðgevingarskyldan er staðfest við skjótari sosialfakligari ráðgeving og sum verandi fjølbroytt eins og at ráðgevingarskyldan eisini fatar um uppleitandi arbeiði, eins og hon eisini verður veitt hjúnafelaga. Tað hevur tó stóran týdning, at Almannaverkið eisini hyggur at, hvørja hjálp persónar kunnu fáa sambært aðrari lóggávu, ið Almannaverkið umsitur, so eingin borgari dettur niður millum, men altið verður ráðgivin á besta hátt.

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands
Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

***Hoyr – Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum hevur hesar viðmerkingar:***

***Kapittul 1 Ráðgevingarskylda § 2 og 3***
*Vísandi til fundin um vælferðarlógina týsdagin 4. september 2018 í MEGD, vilja vit í Hoyr gera vart við tvey umráði, ið viðkoma okkara limum.*

***1. Tryggja talu- og hoyrivenjing til Cochlear Implant brúkarar yvir 18 ár***
*Talið av deyvum og illa tunghoyrdum, ið fáa hjálpartól, gerst støðugt hægri. Tey flestu, ið eru fødd deyv, ella sum seinni missa hoyrnina, fáa eitt Cochlear Implant, vanliga nevnt CI. CI er eitt hoyritól, ið sendir elektrisk signal til heilan, sum við venjing kann læra at uppfata hesi signal sum ávikavist talumál ella ljóð.*

*Fyri at fáa fullan ágóða av CI tólinum, er tað av stórum týdningi, at viðkomandi fær talu- og hoyri frálæru. Frálæran snýr seg um ljódliga og málsliga medvitið og venur brúkaran í at skyna á og kenna ljóð aftur, tað veri seg í talu ella umhvørvisljóð.*

*Sum støðan er í dag, eru børn undir 18 ár tryggjaði talu- og hoyri venjing, men ikki tey yvir 18 ár.*

***2. Námsfrøðiliga ráðgeving til fólk, ið bera hoyribrek***
*Talið av hoyritólsbrúkarum er í vøkstri. Altjóða tøl vísa, at áleið 6. hvør borgari hevur avbjóðingar í mun til hoyrn, tvs. uml. 3060 fólk av 51.000 í Føroyum. Sambært "Hørelsen" hevur áleið helvtin av øllum yvir 75 ár niðursetta hoyrn*[1]

*Í Føroyum hava vit læknavísund og hoyriklinikkir, ið eru før fyri at meta um og veita hoyritól, BAHA og CI. (Tey bæði síðstnevndu eru serlig hoyritól til fólk, við nógv niðursettari hoyrn). Vit hava teknmálstulkar og skrivitulkar, ið kunnu tulka, men ... "Ein tulkur er uttanveltaður og er ikki stuðul ella ráðgevi hjá brúkaranum"*[2]

*Okkum manglar fakfólk, ið kunnu vegleiða hoyribrekaðum – herundir tunghoyrdum, fólki við tinnitus og øðrum - í at liva við einum hoyribreki, vegleiðing í at skapa bestu umstøðurnar og á tann hátt kunna gera brúk av síni resthoyrn. Endamálið við tílíkari ráðgeving, er at bøta um lívsvirðið hjá tí einstaka, at stuðla einstaklinginum í at nýta tilvitaðar samskiftisætlanir og tryggja, at einstaklingurin fær mest møguligt burturúr hoyritólinum og í síðsta enda at fyribyrgja sosialt einsemi.*

***Vit í Hoyr vilja tískil heita á Almannamálaráðið um at taka hesi tvey tilmæli við í komandi lóggávu.***

1. *Øllum, ið hava fingið Cochlear Implant, skal verða í boði at fáa talu- og hoyrivenjingar*
2. *Fólk við hoyribreki, hava rætt til námsfrøðiliga ráðgeving*

*Vegna Hoyr – Felagið fyri hoyribrekað, Majbritt Jacobsen, Forkvinna*

---

[1] hoerelse.info
[2] http://www.tulktekn.fo/

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo

*Niðanfyri í fótnotu 3 verður víst til danska lóggávu, ið tryggjar vaksnum serfrálæru*[3]

**§ 3 Sosialfaklig meting, ætlan o.a.**
MEGD fegnast um, at greinin leggur upp til, at persónar í størst møguligan mun kunnu liva sjálvstøðugt og fáa ein innihaldsríkan dag og fáa gagnnýtt egnar førleikar. Her sær MEGD stóran týdning í, at persónar hava rætt til at vera við í viðgerðini av sínum egna máli. Eisini vil MEGD vísa á, at tá tað í stk. 2 stendur, at Almannaverkið ger av, á hvønn hátt hjálpin sambært hesi lóg skal veitast, at sjálvsavgerðarrætturin verður virdur.

MEGD fegnast um ásetingina, at ein heildarætlan **í samráði** við borgaran verður gjørd.

**§ 10 Uppihaldsveiting**
MEGD vil peika á avbjóðingar í lógini, sum ger mun á hjúnafeløgum og fólki í parlagi. Her eiga pør at verða javntstillað, so hesi eru líka fyri lógini í mun til inntøku hjá hjúnafelaga/samlivandi parti.

**§ 25 Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku**
MEGD fegnast um, at veitt verður endurgjald fyri mista inntøku, tá ið persónur í heiminum ansar m.a. nærskyldum við seinheilaskaða, sum ikki hevur fingið bjóðað pláss á vardum bústaði. Í hesum sambandi vil MEGD peika á stóra tørvin og avgjørdu avbjóðingina í vantandi vardum bústøðum, serliga í Suðurstreymi, sum eigur at verða loystur. Mangul á bústøðum til fólk, ið bera brek, kann verða tyngjandi fyri tey avvarðandi, og eigur ein loysn at verða funnin á hesum, sum veruliga er avbjóðingin.

**§ 33 Námsfrøðilig ráðgeving**
MEGD fegnast um, at vælferðarlógin tekur námsfrøðiliga ráðgeving við. Tó verða bert ávísir bólkar nevndir í serligu viðmerkinginum til greinina. Her vil MEGD peika

---

[3] **Bekendtgørelse af lov om specialundervisning for voksne**
Hermed bekendtgøres lov om specialundervisning for voksne, jf. lovbekendtgørelse nr. 929 af 25. august 2011, med de ændringer, der følger af § 2 i lov nr. 378 af 28. april 2012 og § 14 i lov nr. 632 af 16. juni 2014.
Den bekendtgjorte lovtekst vedrørende § 1 b, § 4, stk. 1, 2. pkt., § 5, stk. 4, og kapitel 5 b, træder i kraft den 1. januar 2016, jf. § 11, stk. 2, i lov nr. 632 af 16. juni 2014 om kommunernes overtagelse af de regionale lands- og landsdækkende undervisningstilbud.
Kapitel 1
***Specialundervisning for voksne***
**§ 1.** Kommunalbestyrelsen skal sørge for, at personer med fysiske eller psykiske handicap, der bor eller længerevarende opholder sig i kommunen, efter undervisningspligtens ophør kan få undervisning og specialpædagogisk bistand, der tager sigte på at afhjælpe eller begrænse virkningerne af disse handicap (kompenserende specialundervisning). I tilknytning hertil kan der etableres undervisning, som er tilrettelagt under hensyntagen til deltagernes handicap. Undervisningen kan indrettes i kostskoleform. Undervisningsministeren kan fastsætte nærmere regler om placeringen af kommunalbestyrelsens undervisningsforpligtelse over for personer med fysiske eller psykiske handicap, der bor eller opholder sig i boformer efter §§ 107 og 108 i lov om social service.[3]

á, at brekøkið er fjøltáttað og tað hevur týdning, at tað verður tryggjað, at námsfrøðilig ráðgeving eisini fevnir um aðrar bólkar, so sum fólk við afasi, deyv, tunghoyrd, tey, ið hava fingið nýggja tøkni t.d. CI og tey, sum hava trupult við at samskifta. Her verður hugsað um frálæru í ymiskum slagi av samskifti, ráðgeving í arbeiðsvenjing, sernámsfrøðiliga hjálp við brúki av hjálpartólum og tøkni. Eins og sálarlig hjálp, um tørvur er á tí. Hetta eigur umframt persónin sjálvan eisini at fevna um avvarðandi og møguligar stuðlar. MEGD leggur upp til, at hugsað verður um at gera ein tali- og hoyridepil, har slíkar tænastur verða veittar og savnaðar. Her eru børn og ung undir 18 ár fevnd av Sernámi, og tó eru fleiri, ið eru eldri. Sjóndepilin hevur ment tænastur til fólk við sjónbreki. Líknandi tilboð er ikki til fólk við hoyribreki í Føroyum.

**§ 35 Stuðulstænasta**

MEGD vil í hesi grein peika á týdningin, at persónar, ið eru heimabúgvandi við likamligum ella sálarligum breki fáa ein virknan og innihaldsríkan dag. Hetta eigur samstundis at merkja, at stuðulin í summum førum m.a. kann veita praktiska hjálp í heiminum, húsligar uppgávur inni og úti, sum tann, ið ber brek, annars hevði gjørt, men longur ikki er førur fyri. Hetta skal m.a. lætta um gerandisdagin hjá hjúnafelaga og avvarðandi.

Stk. 2 um umsorgan og praktisk hjálp til dagligar uppgávur. MEGD heitir á Almannamálaráðið at nágreina, hvørjar dagligar uppávur talan er um og heita á myndugleikan, at stuðulstænastan eisini kann fevna um vanligar praktiskar uppgávur í heiminum fyri at lætta um hjá hjúnafelaganum. Verður ein persónur fult óarbeiðsførur eitt nú vegna umfatandi lamni, fella allar uppgávur á hjúnafelagan, soleiðis at arbeiðsbyrðan hjá honum kann gerast ov tung.

**§ 36 Borgarastýrd stuðulstænasta**

Á sama hátt, um borgarin fær BPA, at hann fær framt tær praktisku uppgávurnar. At hann sjálvur kann avgera, hvat tænastan kann nýtast til, og at "Borgarin verður tikin við uppá ráð", sum andin í lógini leggur upp til. At her eisini verður hugsað um, at tænastan kann lætta um hjá hjúnafelaganum, har tað **ikki er møguligt** (sum við ávísum lamni) at gera borgaran meira sjálvhjálpnan við stuðli.

MEGD vil heita á myndugleikan at útgreina, hvat tað vil siga, at stuðulstænastan kann veitast persóni, ið megnar at umsita stuðulstænastuna. Í viðmerkingunum stendur, at persónur, ið hevur tætt tilknýti til persón, sum skal hava borgarastýrda stuðulstænastu, ikki kann setast sum stuðulsfólk. Hetta metir MEGD kann avmarka sjálvsavgerðarrættin hjá persóninum, ið skal hava borgarastýrda stuðulstænastu. Her er heldur ikki samljóð í lógini. Í nøkrum førum fær familjan ábyrgd, og t.d. her verður familjan frátikin ábyrgd. Atlit skal í einum og hvørjum føri takast til at tryggja privatlív og sjálvsavgerðarrætt borgarans.

Í viðmerkingunum stendur, at tænastan ikki skal fevna um røktaruppgávur. Røktaruppgávur er eitt vítt hugtak, og er ein partur av dagligari lívsførslu. Um hann, sum hevur BPA, í eini handavending ynskir eina hond til dagliga lívsførslu, er tað óheppið, um hendan avmarking ger, at ein triði partur skal inn. Er talan um sjúkrarøkt,

sum krevur fakkunnleika eins og nevnt er viðvíkjandi fysio- og ergoterapi er tað skilligt, at BPA ikki umfatar slíkar tænastur.

**§ 38 Viðlíkahaldsvenjing**

MEGD fegnast um ásetingina við viðlíkahaldsvenjing. Her vil MEGD staðiliga heita á myndugleikan at tryggja, at borgarar, ið eru yngri enn 67 ár ikki liggja ímillum land og kommunu í og við, at tænastur undir 67 eru undir Almannaverkinum og yvir 67 hjá kommununum. Eisini eigur at verða sett inn við nóg mikið av orku og fígging, so møguligt er við tíðini at byggja upp eina góða tænastu.

Eftir ásetingini hevur Almannaverkið myndugleika bæði at avgera, hvussu leingi játtanarskeiðið verður og hvussu viðlíkahaldsvenjingin verður veitt. Her vil MEGD peika á avgerðandi týdningin í persónligari rættartrygd og møguleikan persónliga at hava ávirkan á avgerðir, ið viðvíkja einum sjálvum.

**§ 42 Tulkatænasta**

MEGD fegnast um, at tulkatænastan er staðfest í lógini. Ikki er ásett í lógini, hvat slag av tulki talan er um, men í viðmerkingunum er víst til bæði skrivi- og teknmálstulking. MEGD vil her eisini vísa á vandan við, at hækkandi prísur av tænastuni, sum kom í gildi í summar, kann vera við til at avmarka nýtsluna av tænastuni. Hetta eigur at verða tikið upp og eftirmett.

**§ 43 Flutningstænasta**

Eins og stendur í viðmerkingunum til greinina, kann tað vera ein avbjóðing fyri ein stovn sum Almannaverkið at hava eina vælvirkandi og landsfevnandi flutningstænastu.

MEGD metir, at tað kann tyngja um støðuna hjá avvarðandi, at tað verður álagt teimum at vera flutningstænasta. Eisini vil MEGD vísa á avbjóðingina í, at tað er Almannverkið, sum einsamalt tekur avgerð um flutningstænastu. Serliga, tá tað samstundis verður staðfest í viðmerkingunum, at tað er ein avbjóðing fyri Almannaverkið at veita flutningstænastuna.

MEGD vil heita á myndugleikan um at skipa ymisku tilboðini so sum virknistænastur og endurvenjingar til borgararnar so tætt við heimið hjá borgarunum sum gjørligt.

**§ 46 Vardir bústaðir**

MEGD vil vísa á, at tað fyrst og fremst verður hugsað um borgarans tørv, og tá ið tað í viðmerkingunum stendur at "treytin fyri, at persónur kann halda áfram í vardum bústaði hjá landinum, er, at endamálið við uppihaldinum frameftir eisini verður rokkið", kann ivamál vera um, hvat tað merkir. Um ein borgari hevur búð á vardum bústaði eitt langt lív við stuðli og tí sum annars hoyrir til, skal borgarin helst ikki flytast úr sínum heimi. Bæði borgarin og ella avvarðandi skulu takast við í avgerðini, um flytingin er neyðug.

**§ 62 Umsiting av uppihaldsveiting**
MEGD vil vísa á avbjóðingina í, at Almannaverkið her kann taka avgerð um, hvussu uppihaldsveiting hjá persónum, ið ikki megna at umsita uppihaldsveiting, skal útgjaldast. MEGD vil her vísa á týdningin av, at persónar ongantíð verða settir undir umsiting, uttan sjálvur at hava givið samtykki. Her skal stuðul, ið persónurin tørvar, veitast, og tað skal verða tryggjað, at hetta verður gjørt við virðing fyri rættindum og ynskjum hjá viðkomandi. Eisini skal hann verjast ímóti misbrúki, har ein óheftur myndugleiki hevur umsjón við viðurskiftunum.

**§ 64 Ráðgevandi ráð**
MEGD fegnast um, at eitt ráðgevandi ráð kann setast, sum skal ráðgeva í brekpolitiskum spurningum og í viðurskiftum annars hjá fólki, ið bera brek. Nú Ráðið fyri brekað ikki er virkið, vil MEGD heita á myndugleikan um at taka í álvara, at ráðið eisini verður mannað av fólki, ið bera brek. Her kann reglan einki um okkum uttan okkum takast inn.

**§ 69 Eftirlit**
Landsstýrimaðurin hevur námsfrøðiligt eftirlit við tænastum í hesi lóg. Hetta kann tykjast sum ein óklar áseting. MEGD heitir á myndugleikan at skipa eftirlitið bæði sum fráboðað og ófráboðað, og at eftirlitið er eitt uttanhýsis og sostatt óheft eftirlit. Almannaverkið kann ikki einsamalt hava eftirlit við sær sjálvum. Her eigur uttanhýsis eftirmeting at vera ein natúrligur og týdningarmikil partur. Ein eftirmeting, sum vísir á dygdina í tænastunum, og um borgarin fær røttu tænastuna. Hetta tryggjar gjøgnumskygni.

**§ 71 Kærumyndugleiki**
Her eigur at havast í huga, at kærustovunurin fær fígging og orku at viðgera kærur skjótast gjørligt. Tað kann hugsast, at í góðum tíðum koma færri kærur inn. Hugsast kann, at tá ið tíðirnar skifta, og við hesi lógini, sum er ein rammulóg, verða fleiri kærur. Tíðin, ið kærur verða viðgjørdar, eigur at vera so stutt, sum gjørligt.

**AD 2) Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin**

MEGD fegnast um, at tað kemur ein lóg í Føroyum um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin.

MEGD við mæla til, at peningur verður settur av fyrstu tíðina til at kunna og upplæra starvsfólk í, hvussu lógin skal handfarast. Og at gjørd verður ein vegleiðing um valdsnýtslu til fólk við munandi og varugum vantandi/manglandi psykiskum førleika. Sí bókling frá Socialstyrelsen *Magtanvendelse i forhold til personer med varigt nedsat psykisk funktionsevne*[4]

[4] Socilastyrelsen. 2015. Leinki: file:///C:/Users/jonvor/AppData/Local/Microsoft/Windows/INetCache/IE/7X19CJ9B/Fagpersoner_enkeltsider.pdf

MEGD vil harumframt mæla til, at tað verður álagt kommununum og Almannaverkinum at útføra framferðarætlanir (handleplan) til teir borgarar, har ein hevur nýtt vald. Framferðarætlanin skal vísa á, hvussu ein framyvir kann sleppa undan at nýta vald. Endurgeving av orðing í áðurnevnda bóklingi:

*"Udarbejdelse af handleplaner har også betydning for personalets retssikkerhed. Handleplanen sikrer, at tilrettelæggelsen og udførelsen af hjælpen til borgeren ikke overlades til den enkelte medarbejder, men er genstand for en fælles dialog. En dialog, hvor handlinger og metoder i hjælpen til borgere med særlige behov fortsat bliver drøftet på baggrund af* ***etiske overvejelser****."*

**Ad 3) Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. og samband við lóg um almannatrygd vm.**

**§ 9 Tilboð til heimabúgvandi**
Stk. 3. Heimahjálp verður veitt borgarum, sum hava tørv á persónligari hjálp, røkt ella stuðli. Í uppskotinum til løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. verður ásett, at kommunurnar hava ábyrgd av at veita øllum heimabúgvandi borgarum heimatænastu, sum fevnir um heimahjálp og heimasjúkrarøkt. Tískil er uppgávan hjá kommununi at veita heimabúgvandi borgarum, uttan mun til aldur, røkt.

MEGD hevur hesa viðmerking. Í førum, har ein borgari fær umfatandi stuðul heima, skal røktin eisini vera ábyrgd hjá Almannaverkinum bæði hvat stuðli og røkt viðvíkir – so sum tá talan er um eina stovnslíknandi fyriskipan, har Almannaverkið hevur ábyrgd, og samsvarandi niðurstøðu hjá Markamótsnevndini í líknandi máli.

Løgtingslóg um almannatrygd. Viðmerkingarnar s. 49 siga:

*Persónar, sum búgva á vardum bústaði hjá Almannaverkinum ella sjálvsognarstovni, fáa neyðuga hjálp til* ***persónliga*** *og* ***sjúkrarøkt*** *frá starvsfólkum, sum* ***sett eru í Almannaverkinum*** *ella í sjálvsognarstovninum.*

Á stovnum hjá Almannaverkinum verður bæði røkt og stuðul veittur sambært omanfyristandandi og Almannaverkið hevur ábyrgd av røkt. Henda regla eigur eisini at galda fyri persónar, ið hava nógvan stuðul og hava eina stovnslíknandi fyriskipan.

**Viðmerkingar viðv. sjúkrarøkt.** Munur er á røkt og sjúkrarøkt. Er talan um borgara á stovni hjá Almannaverkinum, sum hevur tørv á sjúkrarøkt (sjúkrarøktarfrøði) er tað Heimatænastan, - sjúkrarøktarfrøðingur í Heimatænastuni -, sum eigur at veita tænastuna, tí her er talan um tørv á heilsufakligum yrkisførleika.

**§ 10 Dagtilhald og umlætting**
Lóg um almannatrygd, viðmerkingar s. 48. Frameftir verða tað kommunurnar, sum veita dagtilhald til persónar, sum hava Alzheimers, aðrar demens sjúkur og sclerosu á øðrum stigi.

Gerast skal vart við, at yngri fólk við alzheimer hava ein annan tørv, tí tey ofta eru likamliga virkin, og tann sosialnámsfrøðiligi innsatsurin er tí annarleiðis enn hjá eldri við demens. Teirra støða kann vera øðrvísi eisini á tann hátt, at tey kunnu hava forsyrgjaraskyldu og maka í arbeiði. Mælt verður til samsvarandi avgerð hjá Markamótsnevndini, at tað framhaldandi verður ábyrgd hjá Almannaverkinum, sum hevur serkøn fakfólk, demenssamkiparar, í starvi. Tey, sum høvdu serkunnleika um demens fylgdu við frá eldraøkinum, og eru sett í Almannaverkinum (Løgtingslóg um heimatænastu vm. viðmerkingar s.5).

Tað eru tíbetur fá yngri við demens, hóast tey eru vorðin fleiri. Vansin við at leggja tað undir dagtilhald fyri eldri hjá kommununum er, at teirra tørvur ikki verður nøktaður í mun til at vera virkin, at betra og halda førleikar viðlíka. Tey kunnu sostatt gerast skjótari røktarkrevjandi og flyta fyrr á bústovn.

Tó eigur tað ikki at vera nøkur forðing, um tað er fakliga skynsamt, at yngri hava møguleika at vera á demensdagtilhaldi fyri 67+ í nærumhvørvinum.

MEGD vil at enda aftur vísa til ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, sum bera brek, har endamálið við sáttmálanum er at tryggja, at fólk, ið bera brek, hava somu rættindi, sum øll onnur, og at tey verða vird sum menniskju á líka fót við onnur. Sáttmálin umfatar øll, ið bera brek, og sum kenna tað sum eina avbjóðing at vera partur av samfelagnum á jøvnum føti við onnur. Sáttmálin byggir m.a. á grundsjónarmiðið, at øll hava rætt at taka egnar avgerðir og at vera so sjálvbjargin sum gjørligt.

Vinaliga fyri MEGD

Jónvør Christiansen, aðalskrivari

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo